# ingar



*Sendikvinna Føroya í Íslandi, Gunvør Balle. Hon heldur, at íslendingar hava tann góða eginleikan fram um føroyingar, at teir tora at satsa.*
*- Hetta haldi eg vera alneyðugt, tá man er eitt so lítið land, tí vit hava ikki altíð apparatið til at kanna og fyrireika alt niður í smálutir. Og so skulu vit ikki vera so ljót við hvønn annan, tá tað ikki gongur.*

> ” *- Jantelógin er ikki í Íslandi. Og so hevur onkur sagt, at jantelógin og vælferðarsamfelagið eru tvær síður av somu søk. Men tað eigur at bera til at hava eitt vælferðarsamfelag uttan jantelóg.*
>
> *Gunvør Balle við Sosialin*

harav ein góður partur ongantíð kemur heim aftur, staðfestir Gunvør Balle. Hon ivast ikki í, at vit noyðast at satsa nógv meira upp á vitan í framtíðini, og til hetta krevst eitt vælútbúgvið fólk.

> ” *- Íslendingar virða mentan eins høgt og vinnulívið - bæði tí tað kann loysa seg fíggjarliga, men so sanniliga eisini fyri trivnaðin og samleikan í landinum sum heild.*
>
> *Gunvør Balle við Sosialin*

## At sáa dirvi í fólk

Gunvør kemur sjálv frá einari familju, sum hevur havt tætt og nógv samstarv við Ísland. Tí liggur íslendski hugburðurin til lívið henni ikki fjarur. Vit siga ofta, at íslendingar hava størri sjálvsálit enn føroyingar, og eru meira amerikanskir enn vit. Harafturímóti verða vit løgd undir jantelógina, sum heldur øllum áræði og fyritakssemi niðri.

- Jantelógin er ikki í Íslandi. Og so hevur onkur sagt, at jantelógin og vælferðarsamfelagið eru tvær síður av somu søk. Men tað eigur at bera til at hava eitt vælferðarsamfelag uttan jantelóg, sigur Gunvør Balle. Hon heldur, at íslendingar hava tann góða eginleikan fram um føroyingar, at teir tora at satsa.

- Hetta haldi eg vera alneyðugt, tá man er eitt so lítið land, tí vit hava ikki altíð apparatið til at kanna og fyrireika alt niður í smálutir. Og so eru vit so forbiðið ljót við hvønn annan, tá tað gongur galið, í staðin fyri at taka málið upp, og kanna eftir, hvat vit kunnu læra av tí, sigur Gunvør Balle, sum heldur, at vit skulu blíva nógv betur til at fyrigeva, tá onkur ger okkurt skeivt.

- Í staðin fyri at halda okkum til málið og lýsa tað sakliga, so vit kunnu læra av tí til eina aðru ferð, so fara vit eftir manninum, sigur Gunvør Balle, og nevnir málið um russiska trolaran Olsjanu, har nógvar atfinningar vóru móti persónum.

## Ganga í felag

Spurd, hvat hon sær sum fyrstu avbjóðingina, nú hon tekur við starvinum sum sendikvinna, sigur Gunvør Balle, at hennara fremsta uppgáva verður at gera vart við, at vit nú eru umboðað í Íslandi.

- Vit skulu markera, at vit eru har. Og so skulu vit í dialog við vinnuna her heima, til dømis um Hoyvíkssáttmálan, sum er eitt gott fundament at byggja uppá. Men onki kemur eftir einum degi, og tí er ein tílík avtala bara ein karmur, sum skal mýkjast og nýtast, so vit fáa betri karmar at vinna undir, greiðir hon frá. Og nevnir millum annað, at fyritøkur eru, sum halda tað vera torført at koma inn á íslendska marknaðin. Eitt nú tí, at veterineru avtalurnar við EU koma fram um Hoyvíkssáttmálan.

- So tað er avgjørt nakað, vit skulu stuðla teimum í, sigur hon. Og hon ímyndar sær, at vit í alt størri mun skulu venja okkum við at hugsa um Ísland og Føroyar sum eina felags økonomiska sonu, sum kann bjóða seg fram í felag.

- Íslendingar hava frammanundan drúgvar royndir á øðrum marknaðum, enn vit kenna, og hava eina væl útbygda distribution, eitt nú til USA og Ongland. Vit at royna okkum saman við Íslandi, vinna vit eisini royndir, sum kunnu brúkast, tá vit standa einsamøll, sigur Gunvør Balle.